# B36 helt lív í europeisku vónini

**VODAFONEDEILDIN** Hesaferð bleiv B36 ikki til frens úti á Argjum. Við einum knúsandi 5-0 sigri, samstundis sum Víkingur tapti ímóti EB/Streymi, hevur liðið enn møguleika at røkka Europa

Heri Simonsen

| | | |
|---|---|---|
| AB | 0 | ⚽⚽ |
| B36 | 5 | ⚽⚽⚽⚽⚽ |



*Nikolaj Eriksen og hinir niðurflytararnir úr AB, megnaðu als einki at gera við Klæmint Matras og vælspælandi B36-liðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Við kappingarbyrjan meldaði leiðslan í B36 út, at málsetningurin fyri kappingaárið 2010 var at røkka einum europeiskum plássi. Men so hvørt sum liðið ikki hevur kent sína vitjanartíð, tá møguleikarnir hava verið til staðar, so er europeiska vónin fána alsamt meira og meira.

Men seinastu umførini hevur aftur gingið eftir vild hjá B36, og ígjár lagaði alt seg væl hjá liðnum. Víkingur á fjórða plássi tapti 0-3 ímóti EB/Streymi, samstundis sum árstalsfelagið í Havn loksins vann ein landskappingardyst í bestu deildini út á Argjum. Teir ikki bara vunnu, men vunnu sannførandi 5-0, og eru nú bert trý stig frá tí sera týdningarmikla fjórða plássinum, sum gevur rættin til at spæla í Europa League komandi ár.

Samstundis sum B36 stríðist fyri fjórða plássinum, so kann liðið eisini koma at hava eitt ógvuliga avgerandi orð at siga, um hvør gerst føroyameistari í vodafonedeildini. Í næsta umfari tekur B36 ímóti NSÍ, sum enn livir í FM-vónini, og á seinasta leikdegi tekur B36 ímóti HB, sum er høvuðsbiðilin til FM-heitið. Tí fær B36-venjarin, Allan Mørkøre ongan sum helst trupulleika at seta sínar menn upp til tær báðar seinastu uppgávurnar í hesum kappingarárinum.

### Settu seg tíðliga á dystin

AB var væl við í byrjanini av dystinum leygardagin, men tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin byrjaði B36 at seta tingini uppá pláss. Christian R. Mouritsen og Jákup á Borg høvdu eitt frálíkt bandaspæl, sum endaði við, at Christian R. Mouritsen setti eitt flott langskot í netið. Bert sjey minuttir seinni hevði Klæmint Matras sett eitt innlegg hjá Hjalgrími Elttør í netið, og tá stóð teimum flestu greitt hvønn veg tað bar.

Bert seks minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, tá Róaldur Jakobsen við einum vøkrum dundur-langskoti hevði økt um leiðsluna. Miðskeiðis í seinna hálvleiki átti Róaldur ta avgerandi frí-spælingina til Jákup á Borg, sum økti til 4-0. Tá eitt lítið korter var eftir av dystinum spældi Jákup Hjalgrím Elttør frían, og hann sveik ikki álitið, men skoraði trygt til 5-0.

B36 spældi sera væl, men AB-viðhaldsfólk eru illa nøgd við av-rikið hjá AB-verjuni, sum als ikki var vakin leygardagin. B36 bøtti væl um málúrtøkuna við einum 5-0 sigri, og tað kann fara at vísa seg at verða avgerandi á seinasta leikdegi.

*heris@sosialurin.fo*

## *Viðmerkingar í 3. Hálvleiki:*

- *Allan Mørkøre trívist í frenalandi.*
- *Nú má Sjúrður Olsen bara bíða eftir føstulávint. Tá er loyvt at sláa frensar.*
- *Var tað Sjúrður á Argjum sum segði: »Sikken en kattepine,« í samband við støðuna á Argjum?*
- *Tað verða hvørki HB ella NSÍ, sum avgera FM, men vit, og vit geva tað til EB/Streym. Heilsan ein hvítur tikari.*

## B36 fekk sjey stig ímóti AB

Hini bæði kappingarárini AB hevur verið í bestu fótbóltsdeildini (2007 og 2009) hevur árstalsfelagið í Havn havt stórar trupuleikar við AB, men í ár var søgan øðrvísi. B36 fekk tveir sigrar og ein javnleik ímóti AB í vodafonedeildini í 2010. 500 áskoðarar sóu AB og B36 spæla javnleik 2-2 í fjórða umfari, sum var spælt tann 18. apríl. Tá skoraði Stig Roar Søbstad fyri AB ímóti B36. Bárður Olsen javnaði fyri B36, og Hjalgrím Elttør legði B36 á odda, men ímóti dystarenda tryggjaði Morten Overgaard argjamonnum tað eina stigið. Tá liðini møttust í Gundadali tryggjaði Jákup á Borg B36 øll stigini við einum sigursmáli, sum var skotið tíðliga í fyrra hálvleiki. Var lítið sum skilti liðini tveir teir fyrstu dystirnar, so var søgan ein heilt onnur leygardagin, tá B36 vann ein knúsandi 5-0 sigur.



# FC Suðuroy er nærri bjargingini

**VODAFONEDEILDIN** Suðuroyarliðið vann 2-1 á heimavølli móti B68

Uni Holm Johannesen

| | | |
|---|---|---|
| FC Suðuroy | 2 | ⚽⚽⚽ |
| B68 | 1 | ⚽⚽ |

Tað tykist sum, at FC Suðuroy hevur fingið um endan aftur í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting.

FC Suðuroy vann 2-1 á heimavølli móti B68 leygardagin, eftir at heimaliðið var greitt omaná í seinna hálvleiki.

Palli Augustinussen legði beinanvegin FC Suðuroy á odda, og í seinna hálvleiki økti Dan Djurhuus um leiðsluna, eftir at Jón Krosslá Poulsen hevði lægt væl inn fyri úr vinstru.

Pól Jóhannus Justinussen minkaði um munin til 2-1 stutt undan leikloki, men heimaliðið helt tørn.

*uni@sosialurin.fo*

## *Viðmerkingar í 3. Hálvleiki:*

- *Hvør er tað, sum letur seg í reyð klæðir, fer út at ferðast við fullum posa og kemur heim aftur við ongum? Jólamaðurin ella B68? Veljið sjálvi.*
- *Eg havi bara eitt at siga: Ogor, tygor, rotnar fikur.*
- *Ótrúligt, sum tað altíð eru dómararnir, sum hava skyldina, tá lið tapa. Og skeg, at toftafólk einans tosa um onnur lið, enn teirra egna.*

## FC Suðuroy fekk sjey stig ímóti B68

Megnar FC Suðuroy at bjarga sær rættin at spæla í vodafonedeildini í 2011, so kunnu suðuroyingar hyggja aftur á teir tríggjar dystirnar ímóti B68 við stórari gleði. FC Suðuroy fekk fulla úrtøku – seks stig – ímóti B68 vesturi á Eiðinum í Vági. Tá liðini møttust fyrru ferð í Vági tann 18. apríl, syrgdu Obi Charles við tveimum málum, og Jón Krosslá Poulsen við einum máli fyri, at FC Suðuroy vann 3-1. Øll málini komu í seinna hálvleiki. Liðini deildu stigini, tá tey møttust á Toftum við einum 1-1 javnleiki. Ndende skoraði fyri B68 sjey minuttir áðrenn leiklok, men bert tveir minuttir seinni javnaði Obi Charles fyri FC Suðuroy. Leygardagin syrgdi FC Suðuroy fyri at halda lív í bjargingarætlanini við einum 2-1 heimasigri á B68 vesturi á Eiðinum í Vági.